# *Ársfrágreiðing 2013-14*

Nevndin fór til verka beint eftir aðalfundin 11.mai. Fyrsti fundur var 18. mai, har vit skipaðu okkum og tosaðu um, hvat vit hugsaðu okkum at arbeiða við.

Fyrstu málini vóru:
- at fáa bygt upp samband við skúlastýrini umvegis teldupost og annars at samskifta umvegis heimasíðuna heimogskuli.fo og Facebook bólkin, sum vit skjótt broyttu til eina síðu. Her í var eisini at fáa upplýsingar frá skúlastýrunum um ítøkiliga arbeiðið
- at fáa skipað tiltøk til førleikamenning av skúlastýrum
- at fáa beinleiðis samband og samskifti við Mentamálaráðið og aðrar avvarðandi partar

***Spurnakanning um arbeiðið hjá skúlastýrunum***
Felagið royndi at gera eina spurnakanning í 2012, men hetta var stutt áðrenn skúlastýrisvalið, og undirtøkan at svara var ikki so stór. Tí valdu vit at royna aftur við einum dagførdum spurnaskjalið. Tað var sent út fyri summarfrítíðina við rímiligari langari freist. Tað gekk tó nakað væl longri at fáa svar inn frá nógvum. Nú er svar komið frá 32 skúlum, sum umboða 85% av øllum næmingunum í fólkaskúlanum.

Tað er greitt, at tað er stór spjaðing í, hvussu skúlastýrini arbeiða. Nógv er tengt at skúlastødd og hvussu karmarnir hjá skúlanum eru. Ein av ásettu uppgávunum hjá skúlastýrunum er at gera meginreglur skúlans. Her vísti kanningin, at tað er ikki gjørt í nógvum førum. Spurningurin var nakað ógreitt orðaður, tí tað kundi skiljast, sum tað var verandi skúlastýri, sum skuldi havt sett meginreglur i verk, meðan hugsanin var at fáa at vita um núverandi ella undanfarin skúlastýri hava sett meginreglur í verk. Í samskiftinum um hetta evni er tað vorið greitt, at stórur tørvur er á at fáa styrkt vitanardeilingina frá einum skúlastýri til tað næsta – stovnsminnið er stutt, tá fólk skifta – og at vitanardeila millum skúlastýri og skúlar, so vit kunnu læra av royndum hjá hvørjum øðrum. Her eru felags tiltøk, heimasíða felagsins og heimasíður skúlans amboðini, sum vit meta eru mest nyttug.

Vit hava havt 4 formligar nevndarfundir, hava hitst í Havn leygardag seinnapart, 3 tímar hvørja ferð, umframt felags fundirnar v.m. Annars hava vit samskift í einum afturlatnum Facebook bólki, teldupost og telefon. Hetta hevur m.a. verið um fyrireiking av fundum, um tíðindaskriv og brøv, um spurnakanningina og um uppskot til viðtøkur.

Vit hava eisini samskift við fleiri fólk beinleiðis, fyrispurningar um ymiskt, m.a. um handfaring av onkrum truplum málum. Vit hava útfrá hesum skrivað onkrar almennar tekstir, sum ætlanin er at leggja á heimasíðuna sum eitt slag av vegleiðing til ymisk sløg av málum.

Almennar frásagnir frá fundunum liggja á heimasíðuni. Mál við ítøkiligum fyrispurningum frá skúlastýrum ella einstaklingum eru eftir tørvi anonymiseraði ella generaliseraði ella ikki tikin við í almennu frásøgnina.

***Førleikamenning - Felagsfundir fyri skúlastýri***
Nevndin hevur skipað fyri tveimum tiltøkum til førleikamenning.

Á Venjingarskúlanum 2.11.2013 hildu Jenny Lydersen, Annika Antoniusen og nevndin upplegg. Fokus var á ábyrgd, heimildir og uppgávur hjá skúlastýrum, undirvísing í Heim & Skúla samstarvi og framløga av fyrstu úrslitunum av spurnakanningini.

Á Skúlanum á Løgmannabreyt 15.3.2014 hildu Elisabeth Strengen Gundersen frá FUG og Jenny Lydersen upplegg. Hugt var meira ítøkiliga at, hvat skúlastýrini skulu gera og hvussu hetta kann gerast. Kjak var í bólkum

um fleiri av uppgávunum og uppsamling í plenum. Á hesum fundinum vóru bæði skúlastýrislimir og skúlaleiðarar.

Framløgurnar frá tiltøkunum eru á heimasíðuni.

***Samskifti við Mentamálaráðið***
Nevndin hevði havt nakað av samskifti við MMR. Vit bóðu beinanvegin um fund, har evnini vit ynsktu at tosa um vóru fak- og tímabýti, undirvísingartilfar og trivnaður og átøk móti happing. Eisini ynsktu vit sum heild at tosa um samstarv millum MMR og H&S og hvussu MMR sær fyri sær uppgávurnar hjá skúlastýrum. Vit bóðu eisini um at fáa stuðul frá MMR til felagið, so vit kundu skipa fyri tiltøkum. Fundurin var 1.7.2013.

Saman við fleiri øðrum handaðu vit í juni landsstýrismanninum eitt skriv við áheitan um at geva trivnaðinum í fólakskúlanum hægri raðfesting.

Í oktober skrivaðu vit til MMR um trupulleikar av talgilding av próvtøkum og royndum og um svartíðirnar uppá royndir. Í svarinum varð m.a. sagt at MMR hevur gjørt av, at arbeiða fram ímóti, at allar royndir framyvir skulu verða talgildar. Hetta kann stutt staðfestast frá royndunum og samskiftinum seinastu vikurnar, at tað er nakað á mál. Hetta verður eitt mál, sum skal fylgjast upp í árinum.

***Fólkaskúlaráðið***
H&S hevur havt ein nevndarsess í Fólkaskúlaráðnum, men vit hava ikki luttikið í eina tíð. Vit boðaðu aftaná fyrsta nevndarfund frá, at felagið ynskti, at AS og JP nú umboðaðu H&S. Orsakað av lítlum virksemi í Fólkaskúlaráðnum í 2013 var fyrsti fundurin, sum vit vóru á, 7.11.2013. 5 fundir vóru fram til februar 2014, tá skeiðið hjá verandi ráð er úti. Vit hava verið við til at tulka TALIS spurningar um førleikastovurnar. Ein frágreiðing um forskúlarnar varð gjørd út frá vitjanum, sum høvdu verið, áðrenn vit komu við i Fólkaskúlaráðið. Í skrivingini av frágreiðingini fingu vit sett eina røð av spurningum til orðingar í sjálvari frágreiðingini, men áttu annars ikki lut í eygleiðingunum ella niðurstøðunum.

***Lærarafelagið***
AS og JP vóru á fundi við nevndina í Lærarafelagnum 20.6.2013, har vit umrøddu mál av felags áhuga, m.a. fak- og tímabýti.

***Kveikingardagurin hjá SSP***
TN á fundi 8. 11.2013.

***Undirvísing á Námsvísindadeildini***
JP var á Námsvísindadeildini vegna felagið 9.12.2013, har hann hevði framløgu fyri 1. árs læraralesandi um heim & skúla samstarv. Nevndin er samd um, at vit eiga at raðfesta hetta økið høgt eisini framyvir.

***Skúlaleiðaradagurin***
JP á fundi vegna felagið 10.12.2013.
MMR skipaði fyri fundinum, kunning og kjak um PISA kanningina var á skránni. Tað er fyrstu ferð, at umboð fyri H&S var við. Eisini vóru umboð fyri Lærarafelagið og NÁM.

**Miðladekningur 2013**
***Skúlablaðið***
Hava gjørt fasta avtalu um tilfar til eina síðu í hvørjum blað. Hava havt tilfar í hvørjum blað síðani á heysti 2013.

***Loftmiðlar og bløð***
AS var í Góðan Morgun Føroyar 21.5.2013
AS var í Surk 2.11.13 um kunningarfundin á Námsvísindadeildini
AS var í tíðindasending hjá ÚF um talgilding av próvtøkum v.m. 6. og 7.11.2013

JP var í Degi & Viku 10.12.13 um PISA kanningina
AS var í Radaranum 11.12.13 um PISA kanningina
AS var í Radaranum 12.3.14 um klummu um ábyrgd hjá foreldrum
AS var í tíðindasending hjá ÚF um landsroyndirnar 24. og 28.4
Nevndin hevur sent miðlunum ymiskt tilfar, sum eisini er lagt á heimasíðuna, og okkurt av hesum hevur verið lagt á portalar og prentað.

**Heimasíðan og Facebook**
AS og JP hava leypandi lagt ymiskt aktuelt tilfar á heimogskuli.fo og á FB síðu felagsins. Gamli FB bólkurin hjá felagnum verður niðurlagdur.

Annika Sølvará